DAGSINS MEINING

Fullføra fullveldið uttan fólkaatkvøðu

Nú friður er á politiska pallinum eru tað nakrir, sum standa handan politisku leiktjøldini og smírast. Teir eita Kallsberg og Hoydal. Hvør skuldi trúð, at hesir fullveldisgarpar, ið annars úteftir tóktust so ósamdir – í veruleikanum báðir kenna seg hava skorað. Fólkaatkvøðan, ið teir hvør í sær hava tosað so nógv um, var jú bara eitt skálkaskjól, ein táta. Ætlanin hevur ongantíð verið at spyrja Føroya fólk.

Anfinn´sa orð um, at hann fór ikki út í nakra fólkaatkvøðu uttan so, at fólkið tók undir við uppskotinum frá landsstýrinum, hava ljóðað so demokratisk og skilagóð. Og Høgna´sa orð um, at vit skuldu hava eina fólkaatkvøðu hava ljóðað so sannførandi. Men hvørgin teirra hevur brúk fyri eini fólkaatkvøðu. Tað síggja vit nú. Tí landsstýrið fullførir verk sítt uttan at spyrja fólkið.

Tað ljóðar so tilforlátiligt, at man nú fyllir karmarnar út í Heimastýrislógini og yvirtekur alt, sum yvirtakast kann, samtíðis sum blokkurin verður minkaður. Men tað var jú hetta, sum m.a. løgmaður ikki vildi fara í holt við, um ikki fólkið tók undir við tí við eina fólkaatkvøðu. Við at sleppa hesi sleppur hann undan at fáa veljarans dóm. Løgmaður veit, at hevði veljarin í dag fingið at vita, hvat ein minking í blokkinum uppá 400 mill. við eitt høgg veruliga merkir, samtíðis sum stórmál skulu yvirtakast frá degi til annan, so hevði hann givið landsstýrinum eitt knúsandi nei. Men við tað at eingin verður spurdur, so sleppur landsstýrið at gjøgnumføra sín politikk.

Her er tó eitt men. Og tað er andstøðan. Um hon kennir sína vitjanartíð og brúkar nøvtogu orkuna uppá at fáa ráðgevar og roknskaparkøn at gera sína "Hvítubók" um veruligu avleiðingarnar av hesum drastisku stigum landsstýrisins, so hevði veljarin sagt stopp. Tað áliggur stór ábyrgd á andstøðuni at greina út veruligu avleiðingarnar av komandi kamikaze-politikki samgongunnar. M.a. at greiða frá, at kutan av blokki uppá 400 mill. kr. hevur so stórar ringvirkningar fyri samfelagið, at hetta talið er nærri 700 mill. kr. í veruligum virði, tá avtornar, tá skatturin, MVG og annað er tikið við. Tað, ið hendir nú, er, at landsstýrið er við at koyra fullveldið á sporið uttan fólkaatkvøðu. Var tað ikki løgmaður, sum segði, at fólkið fór at verða spurt fyrst. At minka blokkin við 400 mill. yvir eina nátt (ið svarar til 700 mill miss fyri samfelagið) er ein týðandi slóð móti endaliga fullveldinum! Hví ikki heldur gera hetta við skynsemi!

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Kommandør vitjan í Frelsunarherinum í Tórshavn

Vikuskifti 16.-18. mars vitja kommandørarnir B. Donald og Berit Ødegård Frelsunarherin í Tórshavn. Í sambandi við vitjanina verða møti fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnudagin.

Hjúnini vóru sett í starv sum leiðarar fyri Frelsunarherin í Noregi, Íslandi og Føroyum tann 1. februar 2000. Saman hava tey starvast í Frelsunarherinum í meir enn 30 ár. Størsta partin av tíðini hava tey verið í ymsum londum í Afrika (Zimbabwe, Suður Afrika, Nigeria, Kenya, Tanzania og Uganda).

Kommandør B. Donnald Ødegård er cand. mag. og hevur fleiri ferðir í stytri tíðarskeiðum havt ábyrgd av leiðaraútbúgvingum Frelsunarhersins. Hann var leiðari fyri Offiserskúlan í Akser í Noregi frá 1990 til 1993.

Í 1993 vóru tey næstleiðarar fyri arbeiði Frelsunarhersins í Nigeria. Síðstu 3 árini hava tey verið territorial leiðarar fyri arbeiðinum í Eystur Afrika (Kenya, Tanzania og Uganda).

Í sambandi við vitjanina er divisiónsleiðarin fyri Ísland og Føroyar, major Knut Gamst, eisini í Føroyum og hann verður eisini við til møtini hetta vikuskifti.

Vikuskifti 16.-18. mars vitja kommandørarnir B. Donald og Berit Ødegård Frelsunarherin í Tórshavn

Tummas Hanus Dam bretskur konsul

Bretski sendiharrin í Keypmannahavn, Philip Astley, tilnevndi í gjár Tummas Hanus Dam, keypmann í Havn, til nýggjan konsul. Í stuttum tíðindaskrivi frá bretsku sendistovuni í Keypmannahavn verður sagt, at Tummas Hanus Dam tekur við eftir Johan Mortensen, sum av handilsligum orsøkum er farin frá sum konsul.

Johan Mortensen tók við sum bretskur konsul eftir pápan, Aksel Mortensen, fyri 15 árum síðani.

Blað um ellisakfør

Felagið Føroya Ellisakfør gevur á 10. árið út blaðið Ellisakfør, sum higartil hevur verið sent limum felagsins. Men nú er blaðið eisini at fáa í leysasølu.

Tað er Føroya Shell, sum selur blaðið fyri felagið, og er tað at fáa á Shellstøðunum kring landið.

Blaðið, sum er 32 síður, kostar 20 krónur í leysasølu. Innihaldið í blaðnum ber sjálvandi brá av tí, ið hevur áhuga millum fólk, ið hava áhuga fyri gomlum akførum.

Í blaðnum hesaferð kunnu vit m. a. lesa um Zündapp motorsúkkluna hjá Jan Jespersen, yvirlækna. Súkklan er frá 1956. Eisini er grein um tveir sløkkiliðsbilar úr Klaksvík, sum Sløkkiliðið í Klaksvík og Klaksvíkar býráð hava latið Føroya Ellisakførum í varðvetislu.

Føroya Ellisakfør hevur innrættað gamla vatnbrunnin við Gráastein í Havn til bilasavn. Í hesum nýggju hølum, sum eru 750 fermetrar til víddar, eru longu eini 12-14 gamlir bilar.

Thomas Michael Smith skrivar um ein túr, hann gjørdi saman við bróðrinum, John, og Áka Dimon suður gjøgnum Evropa á motorsúkkluna í 1957.

Føroyska bilasøgan hevur fastan tátt í blaðnum, ið hesaferð er lýst við gomlum myndum, m. a. av gamla Bedfordbussinum hjá Sofusi Joensen í Fuglafirði. Hesin bussur koyrdi rutu millum Fuglafjørð, Gøtu og Toftir.

Áki Dimon, Thomas M. Smith og John Smith á veg suður gjøgnum Evropa á motorsúkklu í 1957

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Mentan:
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Hetlendingar trúgva uppá nýggju Norrønu

-Vit hava hugt ætlanina sera væl ígjøgnum. Og vit meta ikki, at henda ætlanin er ómøgulig. Tað eigur at verða møguligt hjá eini slíkari ferju við verandi ferðaætlan at bera seg. Verður olja funnin við Føroyar, so fer tað uppá longri sikt eisini at verða møguleiki fyri nógv meiri farmi sigur Jeff Goddard, embætismaður hjá Shetland Islands Council, sum júst hevur vitjað í Føroyum

NÝGGJ NORRØNA
Jan Müller

-Vit hava longu tikið avgerðina um at seta 50 mill. kr. í nýggju Norrønu, og eg eri her fyri at tryggja, at alt koyrir, sum tað skal. Vit duga væl at síggja, at tað skal flytast nógv meira av farmi fyri at fáa íløguna at forrenta seg og at talið á ferðafólki eisini skal økjast, men vit trúgva uppá hesa ætlanina sigur Jeff Goddard, sum arbeiðir hjá Shetland Islands Council og har m.a. umsitur ein av mongu grunnunum, sum ger íløgur í nýggj vinnuprojekt sum eitt nú bygging av nýggjari Norrønu.

Jeff Goddard vitjaði í Føroyum nú um dagarnar. Hetta er fyrsta ferðin til Føroyar. Høvuðsendamálið við vitjanini er at menna samstarv millum Hetland og Føroyar, men Jeff ger greitt, at hann er ikki politikari men embætismaður. Hann vísir á, at seinastu tvey árini hava ikki minni enn tríggjar sendinevndir úr Hetlandi vitjað í Føroyum við tí fyri eygað at knýta mentanarlig og handils- og vinnulig sambond við Føroyar. Ferð hansara er so eisini liður í hesum sama.

Tingið í Hetlandi umsitur fleiri ymsar grunnar eitt nú "Shetland Development Trust", sum hevur avgjørt at seta 50 mill. kr. í nýggju Norrønu. Jeff Goddard hevur undir vitjan síni havt samrøður við umboð fyri Smyril Line fyri at fáa tað neyðuga uppá pláss í sambandi við íløguna í Norrønu. Hann hevur sjálvandi hoyrt um tað orðaskifti, sum hevur verið um byggingina av Norrønu, og hevur hann hetta at siga:

-Vit hava hugt ætlanina sera væl ígjøgnum. Og vit meta ikki, at henda ætlanin er ómøgulig. Vit halda, at tað í framtíðini eigur at verða møguligt hjá eini slíkari ferju við verandi ferðaætlan at bera seg. Vit halda eisini, at verður olja funnin við Føroyar, so fer tað uppá longri sikt eisini at verða møguleiki fyri nógv meiri farmi.

Uppá fyrispurning um teir eru sinnaðir at seta uppaftur fleiri pengar í Norrønu, nú tað kanska fer at mangla í her í Føroyum sigur Jeff, at tað vildi verið eitt vánaligt tekin úr Hetlandi at komið við eini størri upphædd, tí Føroyar ikki hava megnað hetta. Hetland hevur heldur einki ynski um at yvirtaka felagið. Jeff Goddard sigur annars, at talan er ikki um eina gávu til føroyingar, nú teir hava avgjørt at seta 50 mill. kr. í. -Hetta er ein avgerð, sum byggir á handil, og tí síggja hetlendingar hesa íløguna sum eina trygd fyri, at Norrøna fer at sigla uppá Hetland í framtíðini eisini.

- Vit vilja fegnir síggja Norrønu oftari í Hetlandi við og eftir farmi og ferðafólki. Hetlendingar síggja t.d. fegnir, at føroyingar keypa seyðakjøt frá teimum. Tað er ikki befongt av munn- og kleyvsótt. Annars verða eingi djór í løtuni flutt úr Bretlandi til Hetlands. Møguleiki skuldi so eisini verið fyri at útflutt fisk til føroyska fiskiídnaðin. Og øvugt. Og eisini tá kemur ein nýggj Norrøna væl við.

-Tá vit tí hoyrdu, at tað var møguligt at keypa partabrøv í Norrønu, hildu vit at tað passaði væl inn í ynski okkara at fáa betri lendsku royndirnar við oljuvinnuni er nakað, sum tí kann gagna føroyingum. Og her kann nettupp eitt gott ferjusamband vera ein av lyklunum til slíkt samstarv.

Jeff Goddard, sum sjálvur kemur úr Kent í Onglandi og hevur búð í Hetlandi í seks ár, ivast annars ikki í, at hetlendingar fegnir vilja geva føroyingum góð ráð í sambandi við útbygging av eini oljuvinnu.

Hvat íløguni í Norrønu viðvíkur, so byggir hon á strategiskar langtíðarætlanir fyri alt økið. Jeff Goddard dylur ikki fyri, at hann heldur íløguna í nýggju Norrønu er skilagóð fyri Hetland, tí teir síggja fleiri nýggjar møguleikar fyri flutningi.

Í fjør útfluttu teir t.d. 12.500 tons av aldum laksi til Týskalands fyrst við ferju til Aberdeen, síðani gjøgnum Bretland og aftur umborð á eina ferju til Fraklands og so víðari við bili til Týskalands. Tað hevði verið nógv lættari og bíligari at brúkt Norrønu og flutt fiskin til Danmarkar og síðani víðari til Týskalands.

Burturkast til Hetlands

Tá gongd kemur á oljuboringina við Føroyar, so vilja hetlendingar fegnir taka sær av tí burturkasti, sum verður frá oljuboringini. Her verður hugsað um tað tilfarið, sum verður brúkt, tá borað verður. Hetta er tilfar, sum má reinsast og skiljast, tá tað kemur upp úr aftur boriholinum, so sum borimóra.

Nógv av tilfarinum frá boring er farið aftur í havið, men nú ES hevur sett lóg í gildi, sum forðar oljufeløgunum at koyra slíkt í havið, verður neyðugt at taka alt burturkastið í land, har tað skal viðgerast í serstøkum útbúnaði. Jeff Goddard nevnir tað so sum ein møguleika at flutt tilfarið við Norrønu til Hetlands, har teir hava útgerðina til at skilja og reinsa tað. Í løtuni eru hetlendingar við at útbyggja útbúnað til at taka sær av borimóru og øðrum tilfari frá boringini.

Spurningurin er so, hvønn politikk føroyingar fara at velja, um teir t.d. eru sinnaðir til at gera íløgur í útbúnað og infrastruktur fyri at viðgera og goyma borimóruna ol. Ella um man heldur velur at brúka eina hetlendska loysn. Tað er m.a. við hesum í huga, at hetlendingar vilja gera íløgu í eina nýggja Norrønu, tí hon uppá longri sikt kann fáa týðning fyri Hetland eisini.

Vilja hava samband norðureftir

Jeff Goddard vísir annars á, at tað fyri tveimum árum síðani var val í Hetlandi og nógvir nýggir politikarar eru komnir í tingið. Meirilutin av teimum vil, at Hetland skal hyggja meira eftir at menna samstarvið við grannarnar fyri norðan, Noreg, Føroyar og Ísland. Samvinnan við Føroyar er avmarkað sum er og vilja hetlendskir politikarar menna hesa. Og her kemur so eisini oljan inn í myndina. Jeff vísir á, at tað kunnu væl vera verkætlanir í sambandi við eina føroyska oljuvinnu, sum hetlendingar eru hugaðir fyri at vera við í.

Skjótt verður eisini sambandið við Aberdeen munandi bøtt. Tvær spildurnýggjar ferjur verða í løtuni bygdar í Finalndi. Ferjurnar, sum sigla millum Hetland og Aberdeen, verða annars mettar sum ein lívlinja millum oyggjarnar og meginlandið, ja tað eru at sammeta við ein vanligan samferðsluveg og tí letur stjórnin eisini stuðul til hesa sigling. Kemur so nýggja Norrøna eisini at sigla uppá Hetland, so verður tað at meta sum samferðsluvegurin til onnur lond, sum Hetland vil hava økta samvinnu við.

Eftir at tað kom fram, at grunnurin í Hetlandi vildi seta pengar í nýggju Norrønu hevur grunnurin fingið eina rúgvu av áheitanum frá føroyingum um stuðul til ymisk projekt.





Soleiðis ímyndar ein teknari sær nýggja terminalin í Lervick, tá tær tríggjar nýggju ferjurnar eru komnar uppá pláss um eini trý ár. Millum hesar er eisini nýggja Norrøna.Tvær verða bygdar í Finlandi og skulu sigla millum Hetland og Aberdeen. Tann nýggja Norrøna er so mikið stór, at havnamyndugleikarnir í Lervick mugu taka hædd fyri nýggju Norrønu, tá teir fara undir at gera terminalin og umbyggingarnar á havnalagnum. Hinar báðar nýggju ferjurnar koma í oktober 2002, og í Hetlandi vóna tey, at nýggja Norrøna kemur til Hetlands á vári ella sumri 2003. Stiplaðu linjurnar vísa tær báðar ferjurnar, sum skuldu sigla til Aberdeen, og so síggja vit vinstrumegin terminalin nýggju Norrønu, sum er so stór, at hon fer út av teknningini.

Jeff Goddard frá Shetland Islands Council hevur júst verið í Føroyum fyri at tosa við Smyril Line og onnur.
Mynd Jan Müller